## *Roknskaparleiðari* til TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

**Til Tryggingarfelagið Føroyar verður søkt eftir roknskaparleiðara.**

***Starvið***
Leiðarin stendur fyri roknskapardeildini og skal skipa fyri, at deildin altíð virkar væl og er ajour við sínum arbeiði.
Roknskaparleiðarin hevur m.a. ábyrgdina av

*Perioduroknskapum, deildarroknskapum, ársroknskapum og øðrum møguligum roknskaparuppgerðum fyri allar deildir og dótturfeløg*

*fíggjarætlanum og uppfylging av teimum*

*likviditetsuppgerðum*

*hagtølum*

***Førleiki***
Tann, sum setast skal í starvið, má hava góðan roknskaparligan førleika, og dentur verður lagdur á góð samstarvsevnir, leiðaraevnir- og royndir. Lønin verður ásett eftir nærri avtalu.

***Umsókn***
Umsóknir, saman við prógvum og viðmælum, skulu verða Starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi hósdagin 22. juni 2000.

*Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Gunnar í Liða, stjóra.*

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
*The Faroe Insurance Company*
Kongabrúgvin, P.O.Box 329, FO-110 Tórshavn, Faroe Islands
Tel +298 345600, Fax +298 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

SANSIR · TEL 355 355



## Starvsfólk

***Søkt verður eftir starvsfólki til áhugavert og fjølbroytt starv í Grannskoðaradeildini í Føroya Banka***

***Starvið***
Arbeiðið fevnir um grannskoðan av:
- Ársroknskapum
- Perioduroknskapum
- Økisdeildum
- Avgreiðslustøðum bankans
- Stabsdeildum

***Førleikakrøv***
Tað er ein fyritreyt, at umsøkjarin hevur útbúgving og royndir frá peningastovni og/ella innan grannskoðan.

***Treytir***
Setanartreytirnar verða avtalaðar eftir royndum og førleika hjá umsøkjara.

Starvið skal setast skjótast tilber, men bíðað verður gjarna eftir rætta umsøkjaranum.

***Umsókn***
Skrivlig umsókn saman við viðkomandi skjølum verður í seinasta lagi 26. juni 2000 at senda

P/F Føroya Banki
Starvsfólkadeildini
Postboks 3048
110 Tórshavn

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Peturi Anfinni Johannesen, grannskoðaraleiðara á telefon 31 13 50 lokal 1225.

FØROYA BANKI



## ACCELERET NLP PRACTITIONER ÚTBÚGVING VERÐUR Í FØROYUM ÁR 2000

Undirvísingin er soleiðis skipað, at tú 1. august 2000 fært sendandi ein lestrarpakka, ið fevnir um bókina hjá Jack Makani "Skab det liv du ønsker", CD'arar við tíðslinjuferðum, video við framløgu av NLP teknikki og lestrarvegleiðing.
Ætlaninin er so at arbeitt verður við tilfarinum, til útbúgvingin byrjar 5. sept. ár 2000.

**Undir útbúgvingini fer tú, at menna og betra evni tíni at:**
- skapa og varðveita gott samband við onnur undir samrøðum og samráðingum
- nýta málsligar vendingar til innsavnan av upplýsingum undir samrøðum og til at vegleiða onnur
- hjálpa tær sjálvum og øðrum í, at seta sær mál, ið verða framd eftir heildarloysnum, ið byggja á grunnleggjandi virðir
- nýta tíðslinjuhættin at loysa upp fyri tíni avmarkaðu sjálvsmynd, og at sameina og røkka mál tíni í framtíðini
- uppliva eina støðu frá trimum ymiskum sjónarhornum, og harvið broyta upplivingina
- broyta innaru myndir tínar og sjálvtos, fyri soleiðis at geva tær sjálvum atgongd til nýggja innaru styrki
- økja hugflog títt, og persónliga smidleika tín
- loysa innaru ósemjur
- arbeiða við hættum til persónliga "sálarliga útreinsan"

**Tíðarskeið:** Úbúgvingin byrjar týsdagin 5. september ár 2000 og endar fríggjadagin 15. september ár 2000.

**Lærarar:** Helena Kongsback og Jack Makani frá NLP Huset, Keypmannahavn.

**Kostnaður:** 9.800,- kr. íroknað undirvísingartilfar og ábit/drekka.

**Tilmelding:** Hjá Dianu Borgnýardóttir
tel. 441100 ella 281044
513 Syðrugøta
Teldupost: dkonsult@post.olivant.fo



## Til sølu

Sprossavindeygu og úthurðar úr pommernskari furu, kjarnatræi, sproytmálað hvítt og v/ aluminiumsglaslistum allan vegin runt.

| | | |
|---|---|---|
| 90 x 120 v/ 2 rammum 3 rútar í hvørjari, | 7 stk. | kr. 24.500,00 |
| 133 x 120 v/ 3 rammum 3 rútar í hvørjari, | 2 stk. | kr. 10.600,00 |
| 47 x 120 v/ 1 rammu v/3 rútum | 2 stk. | kr. 3.960,00 |
| 133 x 60 v/ 3 rammum 1 rútur í hvørjari | 2 stk. | kr. 4.400,00 |
| 90 x 60 v/ 2 rammum 1 rútur í hvørjari | 1 stk. | kr. 1.650,00 |
| 47 x 120 v/ 1 rammu 3 rútar í hvørjari | 1 stk. | kr. 1.980,00 |

Úthurðar 1 stk. h-út og 1 stk. v.-út, 90 x 205 ein v/ fiskabeinsmynstri og ein sløtt kr. 13.600,00

Íalt ...................................................... Kr. 60.690,00

**Ring tlf. 21 71 56**



**DANNY TRANSPORT**
- tá okkurt skal koyrast ella goymast
**Tlf. 319192**

fk




# Kostna›armetingin fer at halda

*- Tá tr‡ tilbo› liggja so tætt, er ikki orsøk til at óttast at tilbo›ini eru ov lág, sigur Klæmint Weihe, nevndarforma›ur í P/F Vágatunnilin. Stjórin í felagnum, Dávid Reinert Hansen, leggur afturat, at nú hesi tilbo›ini eru komin inn, er útlit til, at samanlagda kostna›armetingin kemur at halda*

SVEINUR TRÓNDARSON

Ta› var ein fegin Klæmint Weihe sum Sosialurin fekk or› á, aftaná at tilbo›ini vóru latin upp. Tilbo›ini vóru væl lægri enn rokna› var vi› frammanundan, og hóast ta› í sær sjálvum kann geva orsøk til illgruna, so heldur nevndarforma›urin í P/F Vágatunnilin ikki nakra orsøk ver›a til ta›.

- Eg haldi ikki, at ta› er nakar vandi fyri at tilbo›ini eru ov lág, tá tr‡ tilbo› liggja um somu lei›, sigur Klæmint Weihe.

Vi› vegager›ini bá›umegin — hvør ger hana er ikki endaliga avgreitt — er kostna›urin nú komin upp á 175 mió. krónur. Men sambært stjóranum í P/F Vágatunnlinum merkir hetta ikki, at tunnilin ver›ur 60 mió. krónur bíligari enn mett, tí enn mangla fleiri tilbo›.

- Tilbo›ini, sum vit hava fingi› inn higartil, eru lægri enn ta›, sum mett var frammanundan, men tær 175 mió. krónurnar er ikki tann samla›i kostna›urin. Afturat skal leggjast kostna›urin fyri el-arbei›i, asfaltering og anna›, og ta› er ikki so líti›, sigur Dávid Reinert Hansen, sum tó leggur afturat, at lei›slan og nevndin í felagnum meta, at kostna›armetingin upp á tær 240 mió. krónurnar fyri alt arbei›i fer at halda.

Nú tilbo›ini eru latin upp fara at ganga einar tríggjar vikur á›renn samr-á›ingarnar byrja vi› teir, sum hava givi› tilbo›. Nevndarforma›urin sigur vi› Sosialin, at rá›gevararnir hjá nevndini nú fara at nærlesa tilbo›stilfari, og tá teir eru lidnir vi› ta›, gera teir eitt tilmæli til nevndina.

Men tit hava nevnt, at tir hyggja eftir, um føroyskar fyritøkur og føroysk arbei›smegi er vi› í arbei›inum. Kemur ta› at vera ein partur av grundgevingini fyri hvør fær arbei›i›?

- Ta› er ein partur av tilbo›streytunum. Tvey samtøk hava samband vi› føroyskar fyritøkur og ta› er samstundis tey sum hava lægstu tilbo›ini. J&K Petersen er partur av samtakinum vi› lægsta tilbo›num, og NCC hevur samstarv vi› Byggitek, sigur Klæmint Weihe.

Tá tit vænta at fara undir samrá›ingarnar um ein knappan mána›, nær kann so væntast, at arbei›i› fer í gongd?

- Ta› er ikki óhugsandi, at arbei›i› byrjar beint eftir summarfrítí›ina. NCC hevur enntá sagt, at ver›ur arbei›i› skumpa fram, so taka teir eina hálva millión av prísinum, og ta› er sjálvsagt vert at hava í huga.



Nú hevur J&K Petersen saman vi› hinum bá›um givi› tilbo› í føstum prísum. Kann ta› hugsast, at ta› vera teir, sum fáa arbei›i›?

Ta› ber sjálvandi ikki til at siga naka› um, men tá rá›gevararnir fara at hyggja at tilbo›unum, so ver›ur ta› eisini naka› teir fara at hyggja at. Tilbo›i› í føstum prísum merkir, at samanlagda arbei›i› kostar 162 ella 173 mió. krónur, líkamiki› um ta› koma nógvar ella ongar uppgávur afturat, og sjálvandi skal ta› eisini havast vi› í metingina. Men ta› ber ikki til at siga naka› sum helst í verandi løtu, sigur Klæmint Weihe.

Arbei›i› upp á undirsjóvartunnilin er mett at taka umlei› tr‡ ár, og ta› merkir, at ver›ur byrja› í august í ár, so fer at vera koyrandi einafer› í seinnu helvt av 2003.

## Tunnilin kann gerast fyri 150 mió.

*Ta› fer at kosta umlei› 150 mió. krónur at gera tunnilin undir Vestmannasund. Ta› meta tr‡ av teimum f‡ra samtøkunum, sum vóru bo›in at vera vi› í lisitatiónini uppá arbei›i›*

SVEINUR TRÓNDARSON

Seinnapartin í dag, lat stjórin í P/F Vágatunnilin tey f‡ra tilbo›ini upp, sum vóru komin upp á arbei›i›. Og ni›urstø›an er, at tr‡ av f‡ra samtøkum meta, at arbei›i› kann gerast fyri umlei› 150 mió. krónur.

Tr‡ tilbo› liggja um tær 150 mió. krónurnar vi› tilbo›num hjá NCC Norge og NCC Danmark, sum ta› lægsta. Teir bu›u sær at gera arbei›i› fyri 142,3 mió. krónur, ver›ur smælri tunnilin valdur, og 151,6 mió. krónur ver›ur brei›ari tunnilin valdur. Valmøguleikarnir eru, at tunnilin skal vera antin 8,5 ella 10 metrar í diametur.

Næstlægsta tilbo›i› átti Samtaki› vi› J&K Petersen, Mika AS og AF Spesiaprosjekt ASA. Smælru loysnin meta teir kemur at kosta 147 mió. krónur, me›an brei›ara loysnin kemur at kosta 157 mió. krónur.

Tri›lægsta tilbo›i› eigur samtaki› vi› Højgaard & Schultz á odda. Í tí bólkinum eru eisini Selmer Fureholmen ASA og Veidekke ASA, og teirra tilbo› ljó›a›u upp á ávikavist 153,6 og 164,8 mió. krónur.

Nógv ta› d‡rasta tilbo›i› átti samtaki› vi› E. Pihl & Søn, Ístaki og Skanska. Ta› samtaki› hevur mett, at arbei›i› kemur at kosta ávíkavist 195,2 ella 207,4 mió. krónur.




## Móttøka hjá Kaupthing

Hin 1. mars 2000 varð Kaupthing formliga virkið í Føroyum. Síðan hava Føroya Sparikassi og Kaupthing hf. í felag stovnað felagið Kaupthing Føroyar.

Kaupthing Føroyar bjóðar fram tænastur innan handil og ráðgeving á virðisbrævamarknaðunum.
Ætlanin er eisini at luttaka í uppbyggingini av einum føroyskum virðisbrævamarknaði og við tíðini luttaka í eini væntaðari privatiseringstilgongd í Føroyum.

Áhugin fyri hesum virksemi hevur síðan byrjanina verið sera stórur, og Kaupthing Føroyar er longu nú størsti útbjóðarin av hesum tænastum í Føroyum.

Fyri 14 døgum síðan fluttu vit inn í okkara nýggju høli í bygninginum hjá Sparikassanum við Tinghúsvegin.

Í hesum sambandi bjóða vit øllum áhugaðum til móttøku í nýggju hølum okkara á Tinghúsvegi 14:

**Hósdagin 15. juni kl. 15.00 - 17.00**

KAUPTHING FØROYAR
Tinghúsvegur 14 • Tórshavn
Tel 351500 • Fax 351501
www.kaupthing.com

SANSIR TEL 355355